# Antidopingsamskipari til Antidoping Føroyar

Um tú er skipaður og hevur hug til at tryggja ein reinan ítrótt í Føroyum, so er tað møguliga tær vit leita eftir.

**Um Antidoping Føroyar**

Antidoping Føroyar hevur eftirlit við og arbeiðir fyri, at doping ikki fer fram í føroyskum ítrótti. Antidoping Føroyar verður stýrt av eini trýmannanevnd, sum er sett av ÍSF, men skipanarliga óheft av og skilt frá virkseminum hjá ÍSF.

Uppgávurnar há Antidoping Føroyum eru

1) At taka dopingroyndir av ítróttafólki í Føroyum,
2) At melda og leggja mál fram um doping
3) At kunna um doping
4) At luttaka í altjóða arbeiði at fyribyrgja doping, og
5) At ráðgeva og kunna almennar myndugleikar um viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri arbeiðið at fyribyrgja doping.

Antidoping Føroyar hevur tætt samstarv við Antidoping Danmark.

Tú verður sett/ur sum starvsfólk hjá ÍSF, men til dagligt verður víst til nevndina í Antidoping Føroyum. Seks dopingeftirlitsfólk eru knýtt at virkseminum hjá Antidoping Føroyum.

**Um starvið**

Vit leita eftir einum *samskipara*, sum skal skipa antidopingarbeiðið í Føroyum. Talan er um eitt starv, sum egnar seg væl sum eitt starv afturat øðrum starvi. Mett verður, at tú í miðal kemur at arbeiða í 10 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, men við stórum møguleika til at skipa arbeiðið sjálv/ur. Starvsstaðurin er í hølum hjá ÍSF, men møguleiki er eisini fyri at arbeiða heimanífrá.

Uppgávurnar hjá samskiparanum fevna eitt nú um

- At samskipa dopingroyndir í Føroyum. Takast skulu umleið 40 royndir árliga av ítróttafólkum. Uppgávan hjá tær verður at samskipa arbeiðið og senda tiknar royndir til kanningarstovu og móttaka/skráseta svar.
- At kunna um doping, har tørvur er á tí.
- At hava ábyrgd av dopingeftirlitsfólkunum í Føroyum.
- At hava samskifti við Antidoping Danmark
- At vera skrivari hjá nevndini fyri Antidoping Føroyar, sum møtist umleið 4 ferðir árliga.
- At svara fyrispurningum sum koma til Antidoping Føroyar doping.

Um hetta hevur tín áhuga, so ber til at seta seg í samband við Petur Mittún, aðalskrivara í ÍSF á telefon 218284 ella petur@isf.fo ella Jónas Tór Næs, formann í Antidoping Føroyum, á telefon 222838.

Løn sambært nærri avtalu.

**Umsóknir**

Umsóknir og lívrensl og onnur skjøl skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **mikudagin 31. januar 2024.** Umsóknir skulu sendast til antidoping@isf.fo við evninum *"antidopingsamskipari".*

Starvið verður sett skjótast gjørligt.